# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*1. mars gjørdist David Tørnroos stóribeiggi. Tá fingu Inna og Kristian Tørnroos ein son. Hann viga›i 3970 g og var 51 cm langur. Tey eru búsett í Stockholm, men Inna er ætta› úr Sørvági*



*Tann 7. mars fekk Niels Áki ein lítlabeiggja sum var 50 cm. langur og vigaði 3350 gr. Foreldrini hjá teimum báðum eru Ragnhild Guðjónsson og Jákup Mørk í Havn*

22. februar fingu Karin Wolles-Wardum og Fríði Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3900 gr.

24. februar fingu Gerda Joensen, Klaksvík og Sunnvard Andreasen, Mikladali, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4150 gr.

27. februar fingu Elin Poulsen og Ragnar Mouritsen, Frederiksberg, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4020 gr.

28. februar fingu Linda Eliassen og Jann Eldevig, Leirvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3525 gr.

1. mars fingu Annika Hanusson og Petur Meinhard Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2900 gr.

2. mars fingu Marjun Guttesen, Tórshavn og Gulli Johansen, Klaksvík ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3900 gr.

2. mars fingu Miriam og Oddfinn Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3775 gr.

2. mars fingu Tóra Hentze og Hallur Jensen, Sandur, ein son. Hann var 53 cm. loangur og vigaði 4100 gr.

5. mars fingu Annebeth og Arni Abrahamsen, Skipanes, eina dóttur ið eitur Tordis. Hon var 52 cm. long og vigaði 3150 gr.

5. mars fingu Eyðritt Dalsgaard og Sámal Clementsen, Húsavík. eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4000 gr.

6. mars fingu Ingun og Robert Langgaard, Runavík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3400 gr.

6. mars fingu Hildegunn Mortensen og Magni Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 1900 gr.

6. mars fingu Birna Dahl Jacobsen og Ferouz Torki, Keypmannahavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3750 gr og var 52 cm langur.

## Minningarorð

# Bára Jespersen Olsen

**Fødd 8. desembur 1999 • deyð 13.februar 2007**




Eitt klams við portrinum, nøkur blíð orð til Bob, og so opnaði hon úthurðina. Sum vársólin, ið kastar sínar heitu geislar inn í hvønn krók, fylti hon rúmini har hon kom. Hon var upptikin av at taka til sín og gleðast yvir alt sum var rundanum hana. Og fyri Guds smáu skapningum, tey ómælandu dýrini, hevði hon størstu virðing og kærleika til. Undrandi standa vit eftir og mugu staðfesta at tann himmalin, sum hon ikki skilti rættiliga, tá omman andaðist fyri góðum ári síðani, nú er vorðin bústaður hennara.

Góðu Teitur, Eileen og Fróði, tit hava mist tað dýrasta ein kann missa. Frá einari løtu til aðra standa bert tómir lutir eftir og boða frá tí sum er hent. Okkara vón er at góðu minnini um hana vera við til at varðveita Báru í tykkara hjørtum, og at tey kasta sínar heitu geislingar yvir framtíð tykkara, eins og sólin sum troðkaði seg inn ígjøgnum smáu rútarnir í Tvøroyrar kirkju tað løtuna ið Bára varð borin út til sítt hvildarstað. Hóast árini vóru fá, so eydnaðist tað henni at seta síni spor sum vit ongantíð gloyma.

*Gleðist, undrast hvørja ferð*
*Barnalyndið lætt og frítt*
*Varnast ikki vandan her*
*Runt um teg er alt so nýtt*

*Áin sum so blítt kann teska*
*Skiftir henda dagin ham*
*Eingin miskunn kann teg leska*
*Eingin hond tá við teg nam*

*Har sum hondum vantar megi*
*Jesus sjálvur tekur við*
*Leiðir teg á sínum vegi*
*Heim til Guðs við sína lið*

*Hvíl í friði vinur mín,*
*Vard frá øllum vanda*
*Flutt er burtur sálin tín*
*Heilt til himnasandin*

Hvíl í friði góða Bára og takk fyri løturnar saman

**Noomi, Pavla og Chris Jan**

Jón Magnus Joensen:

# Listaframsýning í Smiðjuni



*Frá 9. til 13. mars hevur Jón Magnus Joensen listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

**Fríggjadagin 9. mars kl. 16 letur ein listaframsýning hjá Jón Magnusi Joensen upp í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin er opin til og við týsdagin 13. mars**

FRAMSÝNING

Á framsýningini eru 28 akrylmálningar og 11 akryl- og oljukritstekningar. Stílurin er meira expressionistiskur.

Jón Magnus Joensen er 43 ára gamal og býr á Argjum og hevur gingið á listaskúla í Holbæk. Hetta er fjórðu ferð, hann sýnir fram í Smiðjuni.

Framsýningin er opin: Fríggjadag frá kl. 16-19, leygardag frá kl. 10-19, sunnudag frá kl. 14-19, og mánadag og týsdag frá kl. 16-19.

**mg**